## DAGSINS MEINING

# Neyvan stórar broytingar í Eysturoynni

Størstu valdømini í landinum eru Suðurstreymoy og Eysturoyggin. Ein skuldi tí trúð, at største spenningurin varð knýttur at hesum valdømum til løgtingsvalið. Valini her eru av stórum týdningi fyri landsúrslitið men neyvan henda tær stóru broytingarnar her eins og í smærri valdømunum.

Neyvan verða stórar broytingar millum stóru flokkarnar í Eysturoynni eftir valið 30. apríl. B hevur altíð staðið seg væl í oynni. Spurningurin her er heldur, hvør verður valdur. Har verður helst hørð kapping. Fyrrv. borgarstjórin í Runavík stillar upp og eru kend nøvn bæði á Strondum og í Gøtu. Maðurin á Toftum man sita tryggur, men spurningurin er, hvussu tryggur fyrrv. løgmaður, Edmund Joensen er. Hansara egna heimabeiti er trygt men ikki so stórt samanbera vit við nógvu veljararnar við Skálafjørðin. Men oyramaðurin hevur oftani víst seg at gerast drúgvur, tá avtornar. Tað verður tó “mange bække små”strategiin, sum skal/kann bjarga honum sessin, tí Sundalagið einsamalt er ikki nokk. Valið í Eysturoynni er tí eisini eitt avgerandi innanhýsis styrkival í B.

E tóktist eina løtu at hava møguleika at ogna sær tveir sessir í oynni. Her varð hugsað um at fáa kapping millum Signar á Brúnni og Tórbjørn Jacobsen við tí í hyggju, at báðir skuldu koma inn. Men henda dreymin hjá nýggju leiðsluni í E gjørdi veteranurin úr Fuglafirði til einkis, tá hann – sum øll vita, vónsvikin – gjørdi av at fara úr politikki med alla. Nú ljóðar at oddavalevnið hjá E møguliga ikki stillar upp heldur. Neyvan er hugsandi, at bæði høvuðsvalevnini taka seg aftur.

Vit kunnu so bert gera ta niðurstøðu, at leiðslan í E má taka til takkar við tí eina manninum í oynni, júst sum hon eisini verður at sanna í Norðoyggjum. Eftir øllum at døma hevur víðgongda og lítið semjusøkjandi støðan hjá formanninum í E í fullveldismálinum givið ein so alvorligan baksláttur, at vónirnar/dreymurin um at tvífalda tingmannatalið í bæði Norðoyggjum og í Eysturoynni verður av ongum. So hóast E eydnast at fáa framgongd í atkvøðum kann úrslitið verða, at flokkurin stendur í stað, og tað hevur ongantíð verið ætlanin hjá leiðara floksins, ið hevur gjørt nógv burtur úr at byggja upp eina fólkarørslu rundan um sín egna flokk. Nógv bendir á, at víðgongda linja hansara ístaðin hevur syndrað møguleikarnar fyri slíkari.

A og C fara at varðveita sínar tingmenn í Eysturoynni. Ein framgongd hjá C kann tó fáa týdning fyri tillutan av eykamonnum. Stóri spenningurin er um D fer at fáa mann valdan. Innanhýsis stríðið setur djúp sár, men tað hevur tó eydnast D at fáa sín fyrrv. formann og landssstýrismann Lassa Klein at stilla upp. Um tað fer at gera munin kann bert tíðin vísa. Skal D fáa umboð á ting er avgerandi, hvussu gongst at byggja flokkin uppaftur í Eysturoynni.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Mentan bara í Havn?

**Birgir Kruse**



Í Dimmu týsdagin hevur formaðurin í Tingsins Mentunarnevnd Jógvan á Lakjuni aftursvar til grein, sum stóð í Sosialinum fríggjadagin 15. mars. Upprunagreinin var viðtal við formannin sjálvan, sum mentablaðkvinnan Turið Kjølbro hevði gjørt.

Hóast eg helt samrøðuna i Sosialinum vera skakandi og tænti formanninum í Tingsins Mentunarnevnd til lítlan sóma, vil eg tó ikki gera beinleiðis viðmerkingar til hesa. Tað er Turið’sa borð. Eisini, tá hin spurdi sigur "eg kenni hetta ikki heilt aftur".

Tó, í endanum á báðum greinum er ein ódámligur og í føroyskum høpi í drúgva tíð ókendur tóni og sikti, sum fær meg at støðga á og undrast.

Í báðum førum endar formaðurin í Tingsins Mentunarnevnd við at staðfesta, at mentanin er miðsavnað í Havn. Tí har situr "eitt lítið úrvalslið, sum sleppur at definera, hvat vert er at stuðla!". Orðini og rópiteknið í endanum eigur Jógvan sjálvur í valgreinini í Dimmu týsdagin, so her er neyvan skeivt endurgivið.

Hetta orðalag og sikti er, tað eg veit, nýtt í føroyskum mentunarligum kjaki. Ella í hvussu er ikki hoyrt í drúgva tíð. Mentunarliga at seta høvuðsstaðin upp móti restini av landinum.

Hyggja vit at teim avgerðum, sum eitt nú Mentunargrunnur Landsins hevur tikið, tá umræður stórstu starvslønirnar, sum eru trý ár, so sæst at báðir móttakararnir eru ikki havnarmenn. Hin fyrri fuglfirðingur og hin seinni úr Hattarvík, nú búsettur í Keypmannahavn. So her er ikki nógv hjá havnarfólki at fara eftir, skuldu tey av onkrari orsøk hildið tað.

Til ber eisini at hyggja eftir nevndarlimunum, sum taka dagar ímillum í hesum føri. Formaðurin og ein nevndarlimur eru úr Havn, tvey eru avbygdafólk úr Húsavík og Runavík og ein er ættaður úr Danmark, men í mong ár búsettur í Havn. Skrivarin er sambært Lærarbókini ættaður úr Vík.

Og hyggja vit at øllum umsóknunum, sum koma hesum og øðrum almennum grunnum í hendi, so eru gamaní fleiri úr Havn, men ikki allar. Og so langt ífrá. Alment innlit er galdandi eisini á hesum øki, so har er bara at kanna. Ikki trúgvi eg, at ein adressa er avgerandi í viðgerini av mentunarligum verkætlanum og í metingini av listarligari dygd. Heldur ikki í huganum hjá teimum sum søkja og undir trongum korum virka úti um landið og í øðrum londum við.

Eg loyvi mær tí at spyrja formannin, sum hetta skeiðið hevur verið einki minni enn hægsti lóggevandi myndugleiki á almenna føroyska mentunarøkinum um, hvat hann byggir hetta við tí lítla úrvalsliðnum í Havn á.

Eru tað goldnar starvslønir? Er tað latin stuðul frá almennum føroyskum grunnum? Ella eru tað onnur skrásett viðurskift, sum Tingsins Mentunarnevnd hevur innlit í? Kanska beinleiðis óreglulig viðurskifti, sum landsgrannskoðarin hevur peikað á og sum enn ikki eru komin alment fram?

Ella er tað bara gamla hugtakið "interrós", sum í berari ómegd er kyknað upp aftur?

# Í Suðuroynni skulu verandi og komandi vinnur hava bestu karmar at arbeiða undir

**Johan Dahl**
*Valevni Sambandsfloksins Í Suðuroy*



Mál okkara skal verða at fáa Suðuroynna at blóma. Har sum vinnulívið kann nørast og vaksa seg sunt og sterkt - har trívist fólk, tí tey síggja, at framtíðar livilíkindi undir tryggum karmum eru verd at stríðast fyri.

Vit skulu stríðast hond í hond fyri at gera korini og framtíðina í oynni góð, so fólkatalið í oynni aftur økist, og aldurspyramidan fer at vend rætta vegin.

Tey ungu, sum hava fingið sær góðar útbúgvingar heima og uttanlands, skulu hava nakað at koma aftur til, tí er neyðugt, at nýggjar vinnur, gransking, nýggj - og ella øking av verandi almennum arbeiðsplássum, fáa fótafesti í oynni eins og komandi íverksetarar fáa vegleiðing og stuðul, til at stovna egið virkið.

Vit hava bygt land í mong ártíggju og vilja framhaldandi byggja land - ver við at hjálpa okkum í hesi søk við at seta kross tín við Sambandsflokkin tann 30. apríl – Tað angrar tú ikki.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Til landsstýrið um løgtingsvalið

**Jógvan á Løðuni**



Landsstýrið eigur beinanvegin at taka stig til at fáa nývaldu løgtingsvalnevndirnar (tær sum fíntelja) saman, til sínamillum at samanbera um endaliga uppgerðin av valinum verður gjørd eftir sama leisti í øllum valdømum.

Hetta tí at undirritaði við rættuliga stórari sannføring ivast í um so er.

Sjálvur havi eg verið við til eina fínteljing eftir eitt løgtingsval og tá var mær greitt, at helst verða atkvøður taldar við onkunstaðni, meðan eins vorðnar atkvøður verða vrakaðar aðrastaðni, tí ein fínteljing er ikki bert ein teljing men eisini at ætla um, um tað, ið á atkvøðuseðlunum stendur kann takast sum ein krossur ella ikki.

Her hevði ein uppgerð verið fyribyrgjandi, sum vísti tekin ella merkir v.m. sum ikki kunnu góðkennast sum krossar.

Eisini ivist eg í, um val verða uppgjørd á sama hátt allastaðni. Við seinasta kommunuval varð ein eyka atkvøða góðkend einastaðni, sum ikki hevði verðið góðkend í øðrum valdømum í landinum.

Við eitthvørt val í Føroyum kann oftani henda, at bert ein atkvøða vigar nógv og kann hava beinleiðis ávirkan á hvør landsstýrissamgonga verður skipað.

Tá ið umræður at góðkenna krossar ella ikki, man Jens Marius Poulsen í Havn vera tann maðurin, ið hevur drúgvastu royndirnar her á landi.

Samanum tikið, tað er betri at binda um heilan fingur áðrenn eitt val, enn at royna at mana burtur mistøk eftir eitt val.

# Dávid og Jónatan elskaðu hvønn annan

**Hans A. M. Joensen**

Nógvar kanningar eru gjørdar av lærdum fólkum um kenslu- og kynslív meniskjunnar — ein tann kendasta, men eisini elsta, er hon, sum ber heitið "Kinsey-rapportin". Hesar kanningar hava víst, at umleið ein tíggjundapartur av okkum menniskjum hava sterkari kenslur fyri okkara egna kyni enn fyri hinum kyninum. Tað kvøkkaði mangan mann, fyrst tá ið tað kom fram, men verður í dag tikið sum veruleiki av mentaðum fólki. Nógv lond runt í heiminum hava tikið hetta til eftirtektar og sett lógir í gildi, so tað ikki er bannað at maður kann liva við manni og kvinna við kvinnu eftir teirra innastu kenslum og sannføring.

Hvat grundarlag, vit skulu byggja á, tá ið vit umhugsa og gera lógir, man fyrst og fremst vera at brúka okkara skil og byggja á tann etikk, sum vit meta vera rættan.

Gomlu jødarnir høvdu sín moralkodeks. Vit í dag brúka ikki alt tað, sum teir mettu var neyðugt í teirra samfelag, í teirra støðu tá. Men vit hava teimum nógv fyri at takka, m. a. orðini "trúgv, vón og kærleiki, hesi trý, men størstur av teimum er kærleikin."

Í einum brævi herfyri í Sosialinum nevndi eg, at longu í gamlatestamentutíðini funnust menn, sum løgdu ást við menn; tað sigur, hvussu rúmlig Bíblian er, at hon vil nevna, at Dávid og Jónatan elskaðu hvønn annan.

Lat meg til seinast takka Inga Kirke fyri øll tey skriftstøð, hann blakar eftir mær. Eg kendi tey øll frammanundan. Og míni viðurskifti við Várharra nýtist tú, Ingi Kirke, ikki at bekymra teg um. Várharra og eg hava góð viðurskifti okkara millum.

Lat okkum ikki fáa Taleban-líknandi tilstandir við trúarfundamentalismu í Føroyum ella slíkt, sum í USA førdi til, at ein kristin fundamentalistur drap ein lækna, sum lógliga arbeiddi við fosturtøku.

# Sjálvstýrisflokkurin

**Eilif Brimheim**



Grækarismessuhald hevur nú verið, og eisini høvdu vit eina huganløtu í Stoffalág.

Flokkurin hevur verið fyri kakasti í seinastuni, men tó so eru vit her enn.

Grundsjónarmið floksins eru tey somu, sum tey altíð hava verið. Eitt teirra er at virka fyri sjálvstýri, har málið er, at føroyingar taka fulla ábyrgd av tjóðini og fáa fullan avgerðarætt á henni.

Meiningin við einum ríkisfelagsskapi – sum eg havi skilt tað – er, at partarnir eru líkastillaðir. So er ikki nú, og hetta má og skal broytast.

Fuglurin flýgur best á tveimum veingjum, sum ein av okkara hevur tikið til.

Mær tykist løgið, at fólk, sum halda, at vit føroyingar ikki klára okkum sjávlir, stuna fram við ræðumyndum um kreppuna og tíðina fyri hana. Vit kunnu læra av teimum mistøkum, vit gjørdu, men hetta er í mínum eygum dømi um svartskygni og máttloysi! Um vilji er til staðar, og farið verður hóvliga fram, er einki til hindurs fyri, at vit røkka á mál.

Flokkurin byggir á kristnu siðalæruna og vil verja trúarfrælsið, politiskt frælsi, mentanar- og vinnufrælsi og er ímóti mannamuni og allari happing. Fólkið her hevur altíð lagt seg í Harrans hendur, har vit hava kent tryggleika. Merkið sjálvt er krossur Jesusar, og hetta eyðkennið og okkara verumáti er m.a. nakað, ið fokkurin fer at verja.

Eitt annað stórt mál, ið flokkurin fegin ber fram, er røktar- og ellisheim, vardar íbúðir, ansingar-, barna- og smábarnastovnar – hesi mugu vera bygd eftir tørvi. Tískil vil flokkurin berjast fyri hesum eisini. Tey gomlu, ið hava bygt hetta land, mugu og skulu hava tørv sín nøktaðan. Og tey ungu, ið skulu taka yvir, mugu eisini hava tørvin nøktaðan.

Sjálvur havi eg búð uttanlands í nógv ár og veit, at nógvir føroyingar aftra seg í at flyta heimaftur av teirri orsøk, at eingi ansingarpláss eru til børn teirra. Álvaratos, tað kann ikki vera meiningin.

Tann vitan og tann førleiki, ið hesir landsmenn okkara hava, sleppur ikki at ver Føroyum at gagni, m.a. orsakað av tørvinum á sosiala økinum.

Vit eru longu kolldømdir av meiningarkanningum og øðrum flokkum. Men um tit seta tykkum eina løtu við stevnuskrá floksins, skilja tit ivaleyst, at grundsteinur floksins er, í mínum eygum, ein kensla av stoltleika, megi, dirvi og sinnalagið í hesum fólki, sum býr úti í Atlantshavinum.

Tí heiti eg inniliga á tykkum, ið hava stuðlað flokkinum, tykkum, ið ivast, og onnur um at stuðla okkum fram til løgtingsvalið so stuðlar fokkurin tykkum til næsta val!

Javnaðarflokkurin:

# Fólkið fyrst – vælferð Føroya fólks!

Samgongan:

# Fullveldið fyrst – loysing um fýra ár!

**Birgir Mohr**
*Valevni Javnaðarfloksins á Sandi*



Føroya Javnaðarflokkur fer at fremja eina nýggja avtalu við Danmark – eina sjálvstýrislóg, sum ger, at vit vera innan fyri ríkisfelagsskapin og viðtakast í komandi løgtingsetu.

Harvið skuldi tosið um fullveldi og loysing verið loyst, fyri eina rímuliga tíð framyvir og tær politisku kreftirnar kunnu nýtast til at bøta um korini hjá Føroya fólki.

At seta fólkið fyrst og tess vælferð merkir, at Javnaðarflokkurin fer av øllum alvi at bøta um **livikorini hjá teim eldru og gomlu**. Flokkurin ætlar at byggja 160 nýggj røktarheimspláss. Verður málið nátt, so er ein fittur partur av hesum tørvi nøktaður. Sitandi samgonga bygdi einki nýtt røktarheimspláss í fýra ár.

Eisini fer Javnaðarflokkurin at bøta um pensiónsviðurskiftini soleiðis, at fólkapensiónin og samhaldsfasti tilsamans skulu innan fýra ár hækkast til at geva eina pensión til støk upp á min. kr. 10.000,- um mánaðin og til hjún min. kr. 16.000,- um mánaðin.

Heilsuverkið skal hava nøktandi játtanir, so starvsfólkini ikki vera overvað har og soleiðis at vit sleppa av við bíðirøðirnar til viðgerð á okkara sjúkrahúsum. Føroyingar skulu aftur vera tryggir – tá vit vera sjúk – á hondunum á teim, sum starvast í heilsuverkinum. Undir hesari samgonguni hevur ótryggleikin verið vaksandi.

Skúlaverkið má fáa tær neyðugu karmarnar og játtaninar at virka optimalt í mun til skúlalógina, soleiðis at fólkaskúlin gevur besta førleika til okkara børn og soleiðis at tey, sum starvast við skúlan, kunnu trívast í yrki sínum. Undir hesari samgonguni hava vit fingið verkføll í fólkaskúlanum, sum ongantíð var hent fyrr og helvtin av øllum lærarum í Føroyum vilja í annað starv, tí landsmyndugleikarnir hava niðurprioriterað skúlaverkið.

Tey møguleikaskerdu hava ongan ans fingið hesi seinastu fýra árini. Tað er bráneyðugt at hugsa verður um at bøta um bústaðarmøguleikar og vard arbeiðspláss til hendan bólkin av okkara fólki. Vit eiga at minnast til, at vælferðin verður mett eftir, hvussu teir veikastu bólkarnir í einum samfelag hava tað.

Av hesum og nógvum øðrum orsøkum er tað alneyðugt at orkan hja politikarunum ikki øll fer til at fáast við fullveldi og loysing, men verður nýtt til at varðveita og bøta um – styrkja vælferðina hjá fólki okkara.

Fólkið fyrst, tað vil Javnaðarflokkurin – veljið Javnaðarflokkin.

# Valtilfar í Sosialinum

Treytir fyri upptøku av valgreinum er, at tilfarið verður latið okkum sum teldupostur ella á diskli. Prísurin er hálvur lýsingarprísur.

Fyri valgreinar á valsíðuni í Internet-Sosialinum er prísurin 50 kr fyri hvørja grein, um ikki onnur avtala er gjørd við flokkarnar.

*Sosialurin*